# Sparing – og fleiri inntøkur

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Samgongan situr nú og roynir at finna skil á fíggjarlógini, har risastórt hall er størsti trupulleikin.

Hallið má burtur, siga serfrøðingarnir nú. Nøkunlunda somu serfrøðingar stóðu aftan fyri yvirskriftir í fjølmiðlunum seinasta summar, sum: Tømið landskassan v.m.

At okkurt má gerast við hetta risastóra hallið vita øll, ið hugsa eitt sindur um landskassan.

Sparing, sigur Jørgin Niclasen.

Sami Jørgin Niclasen, sum heldur tað vera altavgerandi at hava eitt Uttanríkisráð fyri 48 milliónir, eina sendistovu í Reykjavík, hvørs sendiharri mest roynist sum tíðindavíðmerkjari hjá Kringvarpinum, og eina sendistovu í London, sum eingin veit, hvat ger. Størsta føroyska hendingin í London í ár verður flaggdagshald, tað var í hvussu er tað, eg fekk burtur úr frálíku sendingunum hjá Rás 2 úr London.

Einasta uttanríkisútreiðsla, eg haldi er til nakra nyttu, er umboðsfólkið í Brússel. Vit koma altíð at hava nært samstarv við EU, so har eigur okkurt umboðsfólk at vera, men tað kann vera sum partur av donsku sendistovuni har.

Her er so ein sparing at heinta, sum er á tí penu síðuni av hálvtrýsj milliónum!

Harnæst kunnu vit koma við fleiri inntøkum.

Í hesum $CO_2$ tíðum hevði tað ikki verið av leið at komið við onkrum grønum avgjøldum, sum høvdu við sær. at vit nýta minni av dálkandi orku.

Tað hevði ikki gjørt nakað, um vit avtóku kvotuna av tollfríðum sigarettum og rúsdrekka. Útlendsk ferðafólk koma ikki til Føroya at roykja og drekka avgjaldsfrítt, so har hevði neyvan verið nøkur minking, og hví skulu tey, ið ferðast nógv (ofta ikki fyri egna rokning) hava stórar fyrimunir at innflyta sigarettir og rúsdrekka tollfrítt?

Fiskivinnan hevur ofta verið uppi, tá talan hevur verið um avgjøld, og eg haldi ikki, at tað hevði gjørt nakað, um fiskidagarnir høvdu verið seldir til tey, ið fáa fiskivinnuna best at hanga saman. Hendan inntøkan hevði verið kærkomin hjá landskassanum, hóast hon ikki altíð hevði verið so stór, tí hon hevði verið alt eftir lønseminum í vinnuni.

Eisini kundi alivinnan latið eitt íkast fyri loyvini at ala. Í øllum førum so mikið sum tað almenna letur til havbúnaðarroyndir!

Rentustuðulin til egnan bústað hevur ofta verið uppi og vent. Fyri jól varð lógin broytt, so nú fæst stuðul bert til bústaðin, har tú býrt, men samstundis var markið fyri rentur, ið geva stuðul, hækkað frá 120.000 til 150.000.

Ein hækking, sum eftir mínari meting ikki gav nakra meining!

Eg haldi, at tað er rætt at geva einhvønn stuðul til fólk, ið seta búgv, men tað er ikki rætt at geva stuðul til luxusbústaðir. So er spurningurin, hvat er luxusbústaður. Mín meining er so tann, at tá fólk hava fingið stuðul upp til rentur á 120.000 kr., so má vera nóg mikið stuðlað. Ynskir onkur at taka hægri lán, eigur tað at vera uttan stuðul frá landi og kommunum.

Nú siga óivað onkur, at í Havn kann man ikki seta búgv við láni, ið kostar minni enn 120.000 kr. í rentum um árið. Hetta haldi eg er vrøvl, tí kostnaðurin fyri hús, tað verið seg lønir og tilfar lagar seg til tann veruleikan, sum er, og um tann veruleikin er stuðul til rentur upp til 120.000 kr., so vil húsamarknaðurin laga seg til tann kostnaðin.

# Ein innilig áheitan til játtandi myndugleikan og miðlarnar

**– nú tað er spenninur um, hvørt føroyska Anna sleppur í X Factor finaluna í Parkini.**

FRÍÐÁLVUR JENSEN



Tað kann gott vera, at vit uppliva eina kreppu, men tað er umráðandi, at vit síggja allar teir ljósu spírarnar, sum stinga seg upp í løtuni.

Eg skal yvirhøvur ikki taka alt fyri givið, men eg havi roynt at fylgt Annu í hennara fantastisku roynd at koma í finaluna í Parkini, og tað skal ikki undra meg, um tað fer at eydnast henni.

Hennara evnum feila so ONKI!

Nú er so spurningurin, um vit her í Føroyum eiga at síggja møguleikarnar í hesum fantastisku evnunum, so tað kann gerast møguleiki fyri, at, fyrst og fremst, hesi fáa møguleikan fyri at byggja víðari á sítt talent – her má og skal latast upp fyri enn størri vælvild – lat "jante" bara sigla sín egna sjógv!

Eg veit ikki um eg havi rætt, men tað er onkursvegna ikki reiðiliga gingið upp fyri ávísum innan játtandi myndugleikan og miðlarnar, at vit, enn einaferð, eru við at uppliva, at eitt av fantastisku talentunum er um at berja seg upp har fleiri túsund bara droyma um at koma?!

Tað er ikki sørt hugstoytt, at fokus er so lítið á hetta, og vil bara heita á ØLL við ynski um, at vit hava enn størri fokus á mongu evnini ímillum okkum, sum bæði vit øll og landið kann fáa stóra gleði av!

Eg havi fleiri ferðir nevnt, hvat vit kundu fingið burtur úr eini sprettandi tónleika- og mentunarligari vinnu, so tað skal eg ikki brúka fleiri orð uppá.

Royni nú at vera á plettinum, nú eitt av okkara fantastisku, føroysku talentum gera seg galdandi.

Tað er mín vón, tí har eru stórir møguleikar!

Enn eitt gott ynski til Annu um, at tað fer at bera á mál hjá henni, tí fyri hana er hetta eitt fantastiskur møguleiki at liva síni evni út, so hon kann gera tónleikin til sína lívsleið.

Vónandi, fara vit at síggja fleiri evnir, og at hesi fáa tað virðiligu viðferð, sum vit skylda teimum.

# Gev skúvoyingum eina vindmyllu, so teir sleppa undan at trilla oljutunnur

BJARTI THOMSEN



Enn einaferð sóu vit í Degi og Viku, hvussu Tummas Frank baksaðist við oljutunnur úti í Skúvoy. Ein glotti var tó at hóma, tí landsstýriskvinnan segðist halda, at best varð um skúvoyingar fingu eina varandi orkukeldu at hita húsini.

Og orkukeldan er beint har. Føroyar er eitt av verðsins bestu økjum til gagnnýtslu av vindorku. Vindferðin er nógvastaðir oman fyri 9 m/s í meðal, og tí kunnu vindmyllur her á landi framleiða tað dupulta í mun til somu vindmyllur aðrastaðir.

Í Nólsoy brúka sethús í meðal 3000 litur av olju (útvið 18.000 kr) um árið til upphiting. Hetta svarar til 25.500 kWt um árið til hita. Tær tríggjar vindmyllurnar hjá SEV í Neshaga framleiða 8.000.000 kWt hvørt ár og kunnu sostatt hita meira enn 300 hús.

Mátingar hjá Nólsoyar Orkufelag vísa, at um veturin brúkar eitt húsarhald dupulta orku til upphiting í mun til um summarið. Orsøkin er sjálvandi meira kuldi og gjóstur um veturin. Vindmyllurnar hjá SEV framleiða eisini tað dupulta um veturin í mun til summarið, tí meira vindur er um veturin. Sostatt er upplagt at brúka vindorku til húshita.

Vindorka er trupul at brúka til el-framleiðslu, tí vindur er óstøðugur og torført er at goyma orku. El skal verða støðugt og SEV ger alt fyri at veita støðugt 220V og 50 Hz. Heilt øðrvísi er at brúka vindorku til upphiting. Her kann orkan goymast í heittvatnstanga, sum veður hitaður, tá vindur er og kølnar spakuliga, tá minni vindur er.

Umhvørvisstovan sigur, at privatir brúkarar standa fyri 30% av $CO_2$-útlátinum, og at húsarhald harvið dálka næstan líka illa sum fiskiflotin. Meginpartuin av útlátinum stavar frá oljubrenning í oljufýringum. Við at leggja um til vindorku verður minni olja innflutt og pengar spardir, tá oljan óiva dýrkar, og samstundis verður minkað um útlátið. Og so sleppur Tummas Frank frá at trilla oljutunnur niðan brekkuna í Skúvoy.

*Nólsoy, tann 7. mars 2010*

# Hvar vil tú búgva?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Vinkona mín, sum arbeiðir við eldri menniskjum segði herfyri: “Eg vil, at eldru fólkini eg eri um, hava tað, sum eg sjálv fegin vil hava tað, tá eg gerist gomul. Soleiðis, sum eg vil, at mamma og pápi mín fáa tað, tá tey gerast gomul.” Haldi, hesin hugburður er hin heilt rætti, tá støða skal takast í mun til eldraøkið. Bæði í mun til innihaldið í gerandisdegnum og í mun til fysisku karmarnar.

Gleðist um, at mong hava hug at kjakast um eldrabústaðir. Jógvan Arge hevði grein í bløðunum um hetta í vikuskiftinum - eri samd í nógvum av tí, hann ber fram. Veit tó ikki, hvagani hann fær hatta við, at eg vil steðga ætlaðu røktarheimsbygginigini. Havi hvørki sagt ella skrivað eitt orð um tað! Men eg haldi, at vit eiga at endurskoða um verandi ætlanir eru tær rættastu. Eri púra við upp á at eldrabústaðir skulu byggjast. Men, eg kenni meg ikki sannførda um, at øll ætlaðu røktarheimsplássini eru hin skilabesta loysnin.

Eg hitni um oyruni, tá eg hoyri at:

- Eldru fólkini ynskja sær ikki eitt røktarheimspláss
- Aðrastaðni verður farið burtur frá hesum byggihátti og røktarheimspláss verða beinleiðis niðurløgd
- Hvørt røktarheimspláss kostar góðar tvær milliónir at byggja
- Rakstrarútreiðslan er ein hálv millión árliga – fyri hvørt røktarheimspláss.
- Í dag er talan um antin sethús ella røktarheim, tørvurin er fjølbroyttari enn so
- Okkum fer at tørva meir enn 700 starvsfólk innan Nærverk komandi árini, í stóran mun tí tað gerast fleiri og fleiri eldru fólk

Jógvan Arge lýsir væl í grein sínari, at neyðugt er við fjølbroyttum búmøguleikum og fíggingarmøguleikar. Júst so! Vil siga at tað er ‘essensurin’ í uppskotinum hjá tjóðveldi. Vit halda tað er ein trupulleiki, at landið rindar 700túsund fyri hvørt røktarheimspláss, 80túsund fyri hvørt sambýlispláss – meðan eingin stuðul yvirhøvur verður latin til aðrar eldrabústaðir. Við slíkum hugburði og stuðulsskipan verða sjálvsagt einans røktarheimspláss bygd.

Í álitinum um eldrabústaðir frá 2002 stendur m.a.:” Lutfalsliga stórar røktarheimseindir við 50 ella fleiri búfólkum kunnu, um tær eru bygdar og verða riknar á skynsaman hátt gerast bíligari í rakstri, soleiðis at ráð eisini eru til at veita fyribyrgjandi og heilsfremjandi tænastur. Í hesum høpi skal sigast, at stórar eindir ikki nýtast at gerast ópersónligir stovnar, men kunnu við nútíðarbyggihátti skipast í smærri heimligar eindir.”

Hetta stendur also álitið, sum fakfólk hava skrivað og hvat kemur burturúr? Trý av fýra røktarheimum, sum farast skal undir rúma einans 24 búfólkum! Grundgevingarnar fyri hesum sakni eg. Meini so við, tá har stendur svart upp á hvítt, hvussu raksturin gerst bíligari, hví ganga vit so ikki ta leið? Ikki minst, tá vit vita, at raksturin á hvørjum røktarheimsplássi er ein hálv millión árliga og tørvurin á starvsfólki á júst hesum øki veksur í hvørjum. Hetta grundgevur enn betri fyri fyri, at vit skulu byggja við størsta skynsemi, eisini í mun til starvsfólkatilfeingi. Tað snýr seg um trivnaðin – størst møguliga frælsið fyri tann einstaka. Vit mugu tó loyva okkum at hugsa í langtíðarhøpi – eisini samstundis, sum vit loysa akuttar trupulleikar.

Øllum hesum spurningum og ivamálum tørvar okkum at fáa lýstar og svaraðar í Trivnaðarnevndini. Eg gleði meg til tað. Gleði meg at hoyra Kommunusamskipan Føroya, kommunufelagið, Dennis Holm, Turið Jacobsen ergoterapeut, Nærverkið og fleiri afturat um hetta mál.

**Fleiri viðmerkingar á síðu 19 og 20**